## Stór frágongd í Neistanum

Frágongdin hjá besta kvinnuliðnum hjá Neistanum hevur verið stór í summar. Tað er longu nú greitt, at Annika Ljósstein, Stine Mikkelsen, Trine Olsen, Nicoleta Radu Hansen, Elin Stakksund, Unnur Danielsen og Tórdis Tróndarson ikki verða í hópinum í vetur. Men felagið vónar, at tað eydnaðst at fáa nýggjar spælarar, soleiðis, at liðið aftur í komandi kappingarári kann verða við í stríðnum um heiðursmerki.




## Hamrén rósar Prica

Erik Hamrén, venjari hjá Rosenborg, hevur rósandi orð at bera framherjanum Rade Prica, sum í gjár tryggjaði liðnum øll trý stigini í landskappingardystinum móti Vålerenga. – Hann var eisini toppskjútti í AaB, tá eg var venjari har. Eg var vitandi um hansara frálíku evni, og átta mál í 16 dystum er heilt vist nøktandi, sigur Erik Hamrén við Aftenposten. Rade Prica, sum hósdagin verður vardur av Óla Hansen, Jóhan Troest Davidsen og hinum runavíkingunum, sigur eisini, at hann er glaður fyri sítt skifti til norskan fótbólt.

# Eingin tók av




John Hansen og liðfelagarnir úr AB stríddust væl, tá argjamenn fingu málleysan javnleik á heimavølli móti HB.
Mynd: Savnsmynd

AB

HB

**..og eingin tekur av. Hóast HB leygardagin aftur spældi javnt, eru teir framvegis ikki trýstir av kappingarneytunum í oddanum. Hvørki argjamenn ella teir reyðu og svørtu gagnnýttu møguleikarnar, tá liðini hittust í framskundaðum dysti á Argjum**


uni@sosialurin.fo
Uni Holm Johannesen

Fróði Benjaminsen, Andrew av Fløtum, Símun Rógvi Hansen og liðfelagarnir úr HB høvdu alla orsøk at hanga eitt sindur við høvdinum seinnapartin leygardagin. Í dýrdarveðrinum á Argjum var greitt, at HB bara hevði vunnið tvey stig av seks møguligum seinastu tveir dagarnar. Hósdagin vóru teir hepnir móti B36, og leygardagin tók oddaliðið ikki av, tá grannauppgerð var móti AB. Hóast tað burdi endurnýggja spenningin í oddanum, er veruleikin ein annar. HB er framvegis ikki trýst av kappingarneytunum, og hevur nýggju stig, við einum leiktum dysti meira, til B68 á øðrum plássi, nú landskappingin fer í summarfrí.

### Lítið undirhald

Uppleggið hjá AB var fyrst og fremst at draga ferðina úr dystinum, og tað eydnaðist væl í fyrra hálvleiki. Tíbetur høvdu áskoðararnir sólina at hugsa sær við, tí málmøguleikar og undirhald var sera lítið av á vøllinum. Gestirnir, sum spældu í ljósabláum, vóru fyri tað mesta á bóltinum, og oftast var loysnin at senda bóltin í tómrúmið handan vongverjarnar hjá argjamonnum. Men heimaliðið hevði gjørt sítt heimaarbeiði og var ansi og skipað í verjupartinum.

Tróndur Sigurðsson, sum í fjør var toppskjútti hjá AB, var leygardagin fremsti maður hjá HB. Hann loysti av Andrew av Fløtum, sum fekk ein lítlan snudd í grannauppgerðini móti B36 hóskvøldið. Sigurðsson gjørdi ikki stórvegis um seg, og var skiftur út, tá góður tími var leiktur.

Evrard Blé var einsamallur framherji hjá heimaliðnum einu løtuna. Hann royndist væl, og átti eitt nú millum vandamestu royndirnar hjá heimaliðnum, tá hann royndi seg úr góðari støðu miðskeiðis í seinna hálvleiki.

HB legði seinasta korterið meira fyri í royndini at fáa avgerandi málið, men hóast ymsar møguleikar eydnaðist tað ikki. Oftast vardi Tórður Thomsen, sum stóð væl í AB-málinum, fyri.

### Eingin hóttir

Gestirnir vóru ikki nøgdir við málleysa javnleikin. Seinastu vikuna hevur HB spælt tvær grannauppgerðir móti liðum, ið liggja í niðaru helvtini av stigatalvuni. Tað er ikki nøktandi, men hóast laku úrtøkuna, er tað eingin av hinum liðunum, sum hóttir oddaliðið. Kappingarneytarnir hava ikki verið serliga stabilir, og tað hevur við sær, at teir reyðu og svørtu fara í summarsteðg við eini leiðslu á níggju stig. Og tá kunnu fjeppararnir ikki grenja.

AB er í løtuni á rættari kós. Fimm stig eru til niðurflytingarstrikuna, og tað er sjálvsagt nøktandi hjá uppflytarunum. Fleiri av yngru argjamonnunum hava roynst væl, og tí eru Allan Mørkøre og John Petersen, venjararnir, saman við leikarahópinum, fúsir til seinnu hálvu, tá málsetningurin skal røkkast.

### AB – HB 0-0 (0-0)

**Dómari:** Georg N. Rasmussen
**AB:** Tórður Thomsen – Alex Mellemgaard, Tehe Aristide, Rói Danielsen, Tummas Justinussen – Rasmus Nielsen, John Hansen, Kenneth Jacobsen, Høgni Joensen, Dánjal Rói Olsen – Evrard Blé (Dan Petersen, 90.)
**HB:** Símun Rógvi Hansen – Pætur Jørgensen, Rasmus Nolsøe, Vagnur Mohr Mortensen, Poul Thomas Dam – Kári Nielsen (Ólavur í Ólavsstovu, 68.), Fróði Benjaminsen, Páll Mohr Joensen – Bjarni Jørgensen (Johan Ejvind Mouritsen, 77.), Tróndur Sigurðsson (Andrew av Fløtum, 56.), Rógvi Poulsen

## AB hevur tørv á framherja

- Úrslitið var rættvíst. HB var meira á bóltinum, men høvdu ongar vandamiklar málmøguleikar.

Soleiðis sigur John Hansen, sum aftur leygardagin stríddist væl á miðvøllinum hjá AB. Hann staðfestir, at argjamenn skulu vera nøgdir við øll stigini, sum teir fáa.

- Vit høvdu sjálvagt verið ovurfegnir, um vit høvdu fingið øll trý. Men vit eru nøgdir. Vit fáa einki mál ímóti okkum, og um eydnan var við okkum, høvdu vit fingið mál eftir skjótálop, sum vit dúvaðu uppá, sigur John Hansen.

Hvussu eru tit nøgdir við úrtøkuna higartil í ár?

- Vit hava havt sveiggj í okkara avrikum, men 16 stig og eitt sjeynda pláss er nøktandi. Fólk høvdu ikki væntað hetta undan kappingarbyrjan, so vit eru glaðir, sigur John Hansen og leggur afturat, at AB helst skal fáa nýtt fólk, nú flytingarvindeygað er opið.

- Hópurin hjá okkum er ikki breiður, og vit eru darvaðir av skaðum og øðrum. Venjararnir Allan Mørkøre og John Petersen vóru á beinkinum leygardagin. Vit hava serliga tørv á einum framherja, og eisini millum stengurnar skal nýggjur maður standa, staðfestir John Hansen.